# tul í Føroya søgu



flaggið við bygdarhúsið í húnarhátt



*Uttanfyri Kirkjuna greiddi hendrik Old, frá ymsum forvitnisligum*



*Løgmaður og Per Stig Møller komu til lands í gummibáti.Trygdin skuldi vera ílagi, so øll eru í bjargingarvesti*



*Løgtingsmaðurin, Johan Dahl, sum hevur røtur í Fámjin, var eisini tilstaðar. Myndina tók Erik Christensen*

# Helgi Midjord í Smiðjuni



FRAMSÝNING

21. apríl fuglfirðingurin Helgi Midjord upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Talan er um framsýning við acryl- og høggmyndum, sum Helgi hevur málað og teknað, síðani barnaárini.

Undan hesum hevur Helgi verið partur av fleiri varmakelduframsýningum, og eisini hevði hann eina framsýning í Riberhúsi í fjør.

Tá framsýningin letur upp, fer Helgi sjálvur saman við MC Restorff at spæla og syngja nøkur løg, soleiðis at talan kann gerast um eina uppliving, sum ikki bara snýr seg um myndlist.

**-jm**

# Frits í Tøting



Leygardagin kl. 10 letur Frits Johannesen upp framsýning í Gallerí Tøting í Syðrugøtu. Tað eru eyðkendu vatnlitsmyndirnar hjá Frits, sum hesaferð mynda framsýningina, sum er opin allan apríl og mai mánaða.

**-jm**

# Framsýning í Sirri

Í handilshølunum hjá Sirri suðuri í Vági hevur Vígdis Petersen sølu-framsýning av myndlist og listahandverki innan glas- og keramik. Sagt verður, at framsýningin er opin fram til 1. juli, og at hendan er opin í vanligu upplatingartíðini hjá handlinum.

**-jm**